LM-025/2020

(4)

Jan Simonsen

Fra: Guðrun Maria Mortensen
Sendt: mánadagur, 6. juli 2020 14:54
Til: Jan Simonsen
Emne: VS: Uppskot til Løgtingslóg um royndarskipan um ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð til persónar millum 15-35 ár, sum hava angist ella lætt til moderat tunglyndi

Fra: Landssjúkrahúsið <ls@ls.fo>
Sendt: 6. juli 2020 11:09
Til: Guðrun Maria Mortensen <Gudrunmm@hmr.fo>
Cc: Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>
Emne: SV: Uppskot til Løgtingslóg um royndarskipan um ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð til persónar millum 15-35 ár, sum hava angist ella lætt til moderat tunglyndi

Til Heilsumálaráðið,

Sjúkrahúsverkið hevur hesar viðmerkingar frá depilsleiðsluni á Psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsninum:

Uppskotið um royndarskipan er rættuliga líkt tí skipan, sum varð sett í verk í Danmark fyri nøkrum árum síðani. Í tekstinum verður víst til áltið um sálarheilsu, har m.a. verður sagt " Tilboðið skal grundast á bestu royndirnar frá øðrum londum og verða lagað til føroysk viðurskifti." Tað var ikki uttan grund, at hetta varð undirstrikað har. Hóast tað, so verður valt at nærmast kopiera donsku royndarskipanina, - og út frá hesum sæst ikki, at tær eftirmetingarnar av tí skipanini eru tiknar við.

Hóast Heilsumálaráðið hevur liggjandi eitt uppskot um "Heilsunýskipan" í primera geiranum, har m.a. verður lagt upp til at seta sálarfrøðingar í starv á heilsumiðstøðum kring landið, so verður einki nevnt um hetta í hesum uppskotinum ella viðmerkingunum, men vald verður ein einskiljing av hesari tænastuni, sum væntandi verður ein munandi kostnaðarmiklari loysn enn tann, sum varð lagt upp til í álitinum um Heilsunýskipan. Tá tað samstundis verður sett avmarkað uppædd av til tað tænastuna, sum her verður ásett við lóg, má metast at tað fæst minni heilsutænasta fyri pengarnar.

Í donsku skipanin, sum verður kopierað, verða settar avmarkingar í tí upphædd, sum almenna skipanin vil gjalda fyri tænastuna (pr. viðtalu), so tað ikki bara verður upp til privatu aktørarnar at áseta kostnaðin (meinlíkt tí sum verður gjørt við aðrar tænastur, sum tað almenna veitir til privatar aktørar). Tann møguleiin verður ikki nóg væl tryggjaður í § 2 í lógaruppskotinum (har ein evt prísáseting í so fall má koma undir "o.l")

Vinarliga

Ella Larsen
Stjórnarfulltrúi
Stjórnarskrivstovan
Beinleiðis nummar: +298 304592

Fra: Guðrun Maria Mortensen <Gudrunmm@hmr.fo>
Sendt: 25. juni 2020 18:43
Til: Petur Martin Hansen <pmh@heilsutrygd.fo>; Egil á Bø <eab@heilsutrygd.fo>; Føroya Kærustovnur <fks@fks.fo>; marjusdam@gmail.com; m-dam@olivant.fo; Landssjúkrahúsið <ls@ls.fo>; mail@psykolog.fo; sinnisbati@sinnisbati.fo
Cc: Turid Arge <turid.arge@hmr.fo>; Jan Simonsen <jan.simonsen@hmr.fo>